# » er tað ikki eitt framúr gott hugskot, at ein minnisvarði stoyptur úr bronsju og í fullari stødd verður reistur á Skála yvir okkara besta og virknasta skemtiteknara nakrantíð - Óla Petersen



langt eftir at listafólkið er farið undir grøna túgvu. Hugsi um ódeyðiligu myndina av Monu Lisu og ógrundandi smíli hennara. Bøkur verða skrivaðar, filmar innspældir yvir hetta evnið, og framhaldandi er gátan óloyst. Enn verður gitt: Hvat hugsar hon, hví smílist hon og sær júst soleiðis út.

Í røðu síni nevndi Kári Rembrandt, Picasso, Mikines, Ingálv av Reyni og Sigrun Gunnarsdóttir.

- Jú, nógvar kunnu fyrimyndirnar verða, men eitt er ógvuliga týdningarmikið at leggja sær í geyma. Virðini liggja ikki í kopiunum, men í orginalunum, og Føroyar hava fostrað nógvar orginalar, legði hann aftrat.

## Ingálvur góður sangari

Meðan Kári P. Højgaard var í listarliga horninum, nam hann eisini við tingvarpið, sum sendir regluliga frá løgtingsfundum.

- Ivaleyst hava allir føroyingar sæð málningin, sum prýðir veggin í løgtinginum. Tann fyrsta dagin, eftir at hesin stóri málningur, sum mæti listarmaðurin, Ingálvur av Reyni hevur málað, varð hongdur upp í løgtingsalinum, var Útvarp Føroya á staðnum og spurdi tingmenn, hvat teir hildu um listarverkið. Hóast trupult er at síggja, hvat málningurin veruliga avmyndar, er talan um kunst á hægsta støði. Tingfólkini skulu jú vita og hava eina meining um alt, og tey vóru ógvuliga positiv í sínum ummælum. Tá spurningurin til seinast varð settur løgtingsmanninum, Hendriki Old, hugdi hesin tungvektarin í Javnaðarflokkinum upp á útvarpsmannin. Við einum skálkasmíli, sum segði nógv meir enn orð, svaraði Hendrik Old speiskliga: "Ingálvur av Reyni er ein fantastiskur sangari".

Løgtingsmaðurin nam eisini við fyrrverandi skálalæknan, Sigvald Christiansen, sum hevur rundað tey áttati.

- At hann framhaldandi er still going strong, prógvar eitt tíðindaskriv mikudagin, har fráboðað verður, at Sigvald tekur eitt tørn afturat sum formaður í Landsfelag Pensjónistanna.

Kári helt í hesum sambandi fyri, at fyrr var tað bert í Kina, Kreml og russisku Dumuni, at leiðarar hildu so leingi á.

- Haraftrat er Sigvald Christiansen formaður í virknað Eldrafelagnum Kumlá, har pensjónistar hava møguleika fyri at savnast og stytta sær stundir. Tað má vera ein tryggleiki hjá tykkum eldru her á Skála at hava ein formann sum slóðar fyri og klárar at greiða øll ivamál sum kunnu verða viðkomandi fyri hendan aldursbólk, bæði heilsuspurningar og spurningar viðvíkjandi pensjónini, segði hann.

## Mangt eitt dygdarfar

Kári P. Højgaard fór reikaði rættiliga víða í sínari røðu á Skála leygardagin, og tíverri kunnu vit ikki taka hvørt orð, hann segði, við í hesi grein.

- Á Skála hevur Janus Uldall høvuðsábyrgdina av Kahyttini, sum er undirhúsið í bygdini. Man hetta ikki vera einasta stað í landinum, har menn regluliga hvønn leygardag spyrja konurnar, um einki er at koyra í bingjuna fyri at hava eina umbering at fáa eina fríløtu frá húsliga strevinum at støkka inn á gólvið í Kahyttini. Tá eg vitjaði við bátahylin triðseinasta leygardag, legði eg til merkis, at sera góð manning er tøk at hjálpa til á ruskplássinum.

Kári segði, at einir 4-6 russarar upp á skift eru á økinum og syrgja fyri, at bingjurnar ikki fyllast ov skjótt.

Síðan nam løgtingsmaðurin eisini við Skálafjarðarsangin, ið Nancy Vesterbú hevur yrkt.

- Her sigur hon í 6 ørindi, at "á Skála bygt er mangt eitt dygdarfar, um heimsins høv tey ferðast víða hvar. Her miðvíst arbeiði hvønn ein yrkadag, á fríðum fløtum – fagurt bygdalag.

Kári P. Højgaard helt fyri, at yrkjarin við fáum vælvaldum orðum lýsir eina livandi og skapandi bygd ið hýsir einum arbeiðsplássi, sum hevur verið livibreyðið hjá mangari familju kring Skálafjørðin og runt Eysturoynna.

- Møguleikarnir eru framhaldandi góðir her, og vónandi verður onkur av teimum stóru ætlanunum um skipabygging fyri fleiri 100-tals miljónir veruleiki á Skála í nærmastu framtíð, segði løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, í røðu síni á Skála.

*vilmund@sosialurin.fo*



**HOPLA**

*Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, var rættiliga í hopla, tá hann helt røðu á bygdastevnuni á Skála leygardagin*